HOTEL HAFNIA

Hotel Hafnia

★★★★

In the Centre of Tórshavn

- All rooms with private facitilitites
- Excellent conference facilities with AV equipment
- Sauna bath
- Exclusive Restaurant
- Car-Rental
- Parking lot
- Airport transfer
- Hairdressers/Perfumary
- Travel-office on street level

Áarvegur 4–10
P. O. Box 107
FR-110 Tórshavn
Faroe Islands

Telephone
+298 11270
Telefax
+298 15250

politisk viðmerking

Stórur spurningur um vit kunnu kenna okkum trygg

Vit kunnu ikki selja skinnið, fyrr enn bjørnin er skotin. Men tað er ein veruleiki, at oljufeburin rættiliga er farin at gera um seg í okkara landi. Vit mugu ansa væl eftir, at vit ikki leypa fram av

Spurningurin, sum eg í stuttum fari at viðgera er: Hvat heldur Tjóðveldisflokkurin um Føroyar og oljuna? Hvønn politikk skulu vit reka í samband við eina møguliga oljuvinnu?

Tað kann kann vera eitt sindur torført hjá politisku flokkunum at viðgera hesar spurningar, so leingi vit ikki kenna uppskotið um kolvetnisloggávu fyri Føroyar. Hinvegin hevur Tjóðveldisflokkurin sjálvsagt gjørt sær sínar metingar um hesar spurningar.

Tað er longu nú greitt, at oljufeburin rættiliga er farin at gera um seg hjá einum flestu í okkara landi. Tí er umráðandi, at vit ikki leypa fram av. Bara vitanin um, at olja er í okkara undirgrund, kann geva føroyingum nógvar fyrimunir í altjóða samfelagnum, men hetta setir samstundis stór krøv til politikararnar og tey ráðgevandi í okkara landi.

Tað kann ongantíð vera rætt at selja skinnið á bjørnini, fyrr enn bjørnin er skotin.

Føroyar ikki suverenar

Fyri okkum tjóðveldisfólk er tað ein stórur spurningur, um vit kunnu føla okkum trygg í ti, at tað verður føroyska samfelagið, sum kemur at fáa allan tann pening, sum ein møgulig oljuvinna á føroyska landgrunninum kastar av sær. Her hugsi eg um ta avgjald, sum landskassin skuldi fingið, eini 25%.

Taka vit Hetland sum dømi, so skuldi føroyska undirgrundin við ti tøkni, vit í dag kenna, kunna givið einar 800-1000 miljardir krónur í dagsins prisi. Hetta svarar til 250 milljardir í avgjaldi til landskassan (statskassan), um Føroyar vóru ein suverenur statur.

Hetta er tað sama sum føroyska figgjarlógin í 100 ár!

Men vit mugu siggja í eyguni, at Føroyar eru ikki ein suverenur statur.

Stevna Tjóðveldisfloksins er, at føroyska tjóðveldið verður stovnsett, sjálvt um olja verður funnin ella ikki.

Tað kann ongantíð vera rætt at brúka føroysku oljuna til at uppbyggja ein danskan búskap.

Umsita og löggeva

Tá ið sagt verður, at vit hava yvirtikið umsitingina av møguligum ræevnum í undirgrundini, vil tað siga, at vit kunnu löggeva á økinum, men tað stendur ongastaðni skrivað, hvussu møguligur oljupeningur skal býtast millum ríkispartarnar.

Veruleikin er tann, at vit hava fingið loyvi at umsita ráevnini í føroysku undirgrundini vegna danska kongarikið, sum Føroyar eru ein partur av sambært donsku grundlógini.

Nú kunnu vit spyrja: Hvør hevur givið dønum rætt til at seta donsku grundlógina í gildi fyri Føroyar og at gera Føroyar til ein danskan landslut.

Uppbyggja ein føroyskan búskap

Tað kann vera ein stórur spurningur, um vit í heila tikið skulu geva loyvi til at útvinna olju í stórum nøgdum í føroysku undirgrundini, fyrr enn ognarrættirnir er greiðir. Tað er eisini umráðandi, at vit sjálvi sleppa at leggja okara oljupolitikk til rættis, m.a. hvussu skjótt oljan verður tikin upp.

Tað er í hvussu er ikki nøkur grund fyri at taka oljuna upp úr føroysku undirgrundini til at gjalda skuldina hjá danska statskassanum.

Tjóðveldisflokkurin meinar, at vit fyrst og fremst eiga at konsolidera okkara samfelag so væl sum gjørligt við at uppbyggja ein føroyskan búskap, sum er leysur av ti danska. Tað er treytin fyri, at komandi ættarlið í Føroyum kunnu njóta ágóðan av oljuni.

Menna og fjøltátta vinnulívið

Sjálvandi niðurgjalda vit almennu skuldina (landskassaskuldina) og yvirtaka kommunuskuldina. Hetta ger, at skattatrýstið fellir munandi eins og MVG'ið eisini kann lækka.

Danski statsstuðulin fellir sjálvandi burtur.

Vit eiga serliga at brúka neyðugan pening til gransking, vørumenning og annað organiserandi arbeiði, sum kann stuðla uppundir og skapa karmar um ymiskar framtíðarrættaðar vinnur, ið krevja stóra vitan og geva nógv avkast til samfelagið og nógv arbeiðspláss.

Sjálvandi halda fram við at menna verandi vinnur á kappingarførum støði, fiskivinnuna og alivinnuna. Haraftrat verður stórur dentur lagdur á at skapa alternativar vinnur.

Veita oljuvinnuni tænastur

Føroyingar eiga í størst møguligan mun at fara aktivt inn at veita tænastur til oljuvinnuna (frálandavinnuna). Ein partur av hesum er at skipa fyri tyrluflutningi.

Sum dømi kann nevnast tyrluflúgving.

Í eini kanning, sum varð gjørd fyri sløkum árí síðani, kom fram, at bara hesin parturin kann geva einar 70 milj. krónur í inntøkum um árið og skapa eini 50 arbeiðspláss.

Hetta er sjálvandi treytað av, at vit verða við frá fyrsta degi av og hava fólk við teimum røttu útbúgvingunum til hesar og aðrar tænastur, ið verða neyðugar í eini møguligari oljuvinnu.

Heini O. Heinesen,
løgtingsmaður

tíðindablaðið
sosialurin

Ja! Send mær oljupakkan, sum eg gjaldi 1000 krónur fyri

☐ Viðl. kekki ☐ Postuppkrav ☐ Banka/giroflyting

Navn: .....

Bústaður .....

.....

Postnr, bygd/býur .....

.....

Tel.: .....

Undirskrift: .....

Send lepan til:
Tíðindablaðið Sosialurin,
Box 76, 110 Tórshavn

Mennandi kjak krevur kunnleika;

Í Oljupakkanum fært tú alt tilfarið, sum hevur staðið í Tíðindablaðnum Sosialinum seinastu 25 árini um oljuvinnu og marknasamráðingar. Tilsamans fleiri enn 1200 síður í trimum ringbindum. Oljupakkin er á tremur við upplýsandi greinum, áhugaverdum samrøðum, viðmerkingum og øðrum. Skalt tú fylgja við í dag, mást tú eisini hava bakgrundina við – og hana fært tú frá Sosialinum fyri 1000 krónur!

Bílegg tær oljupakkan nú – 1200 síður fyri 1000 kr.